# FRÁ A TIL Ø UM

**PÁSKIR** Elskaðu páskirnar eru komnar aftur. Men hvat veitst tú um hesa høgtíð? Her eru nøkur svar uppá nakrar spurningar, sum tú kanska ongantíð hevur hugsða um at spurt!

Inna Tørnroos



**A** **Annar páskadagur** var fyrr í tíðini bæði triði og fjórði páskadagur, men varð til ein dag í 1800-árunum.

**Á** **Ápostlasøgan** er tað stað í Bíbliuni, har Jesu deyði og uppreisn verða lýst.

**F** **Fjarður** eru vælumtókt prýði at pynta við á páskum.

**G** **Greinar** eru vælegnaðar at heingja páskapynt og páskareggini í.





**B** **Bloksbjerg** eitur staðið, sum flogið var til Skírishósdag. Tað vóru sjálvandi páskaheksirnar, ið fóru avstað á kustinum.

**D** **Dagurin**, tá Jesus kemur ríðandi inn í Jerusalem, verður nevndur Pálmasunnudagur, tí fólkið heilsaði honum við pálmabløðum.

**E** **Egg** – vit mála, rulla og eta tey á páskum. Fyrr var vanligari, at vit ótu tey rullaðu eggini, nú verða tey oftani liggjandi til fuglar og onnur djór.

**H** **Høsnarungar** eru kanska tað, vit oftast pynta heimið við á páskum. Klipp tær hendan út og líma hann saman – ella nýt hann sum skabilón til tín egna høsnarunga.

**I** **INRI** – stóð á krossinum hjá Jesusi. Tað merkir »Jesus frá Nasaret, kongur jødanna«.

**Í** **Í haganum** er vanligt, at tey fyrstu smálombini eru at síggja um páskirnar.

**J** **Jesu deyði og uppreisn** er orsøkin til, at vit halda páskirnar.

**K** **Knekka egg**, ella hvussu ein ger tað, var fyrr í tíðini eitt tekin uppá hvønn samfelagsflokk ein hoyrdi til. Tey niðarliga á samfelagsstiganum knekkaðu eggið við at banka við eini skeið á tað, meðan tey fínari skóru toppin av við einum knívi.

**L** **Lambssteik** er onki nýtt í Føroyum, men fyri grannalondini er siðurin at eta lamb á páskum nýliga komin frá Miðalhavslondunum.

**M** **Mel Gibson** hevur skrivað og leikstjórnað ein av kendastu filmunum um páskirnar »The Passion of the Christ«. Tað sigst, at Mel Gibson nýtti sína egnu hond sum »standin«, tá naglin skuldi gjøgnum hondina.



**N** **Níggju tímar** hekk Jesus á krossinum, áðrenn hann doyði.